umhvørvisstovan

# Vegleiðing um niðurtøku av eldsløkkiskipanum við halóni

**Henda vegleiðing er ætlað reiðarum, ið hava skip, sum hava eldsløkkingarskipan við halóni, og virkjum, ið taka slíkar eldsløkkingarskipanir niður. Halón er eitt sera virkið ozonoyðandi evni, sum ikki skal latast út í luftina. Allar eldsløkkingarskipanir við halóni skulu verða tiknar niður innan árslok 2013.**

Endamálið við vegleiðingini er at tryggja, at útlátið av halóni í sambandi við niðurtøku av halónskipan um borð á skipum er minst møguligt, og at halónið verður rætt fyribeint (destruerað).

Arbeiðið at taka niður eldsløkkiskipanir við halóni kann einans gerast av virkjum, sum eru løggildað til at veita tænastur innan fastbygdar eldsløkkiskipanir við halóni. Á heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum er listi yvir løggildaðu virkini, www.fma.fo

Útlendskar fyritøkur og einstaklingar, sum mótvegis Sjóvinnustýrinum kunnu skjalprógva løggilding frá avvarðandi myndugleika í heimlandinum ella heimilaðum klassafelag at veita tænastur innan fastbygdar eldsløkkiskipanir við halóni, kunnu eisini taka eldsløkkiskipanir niður.

## Tá eldsløkkingarskipanir við halóni verða tiknar niður, skal:

- Arbeiðið skipast soleiðis, at útlátið av halóni er sum minst.
- Virkið, sum ger arbeiðið, skal:
    - Skráseta nøgdina av halóni, sum verður avtappað,
    - Tryggja sær, at fløskur/tangar eru góðkend og hava góðkendan avtappingarventil,
    - Merkja fløskur/tangar (Halón, tekniskt navn ella formil, UN nr.),
    - Merkja fløskur/tangar við navni á reiðaríi/virki/felag og skipi.
- Tá arbeiðið er liðugt, skal virkið, sum hevur gjørt arbeiðið, senda Umhvørvisstovuni og Sjóvinnustýrinum fráboðan. Hetta við at senda teldupost til us@us.fo og fma@fma.fo við hesum upplýsingum:
    - Navn á virki, sum gjørdi arbeiðið,
    - Navn á persóni, sum vegna virkið hevði ábyrgd av arbeiðinum,
    - Navn á reiðaríi og skipi,



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

- ▷ Nøgd av halóni, sum varð tikin úr eldsløkkiskipanini,
- ▷ Nær og hvar arbeiðið varð gjørt,
- ▷ Navn, teldupost bústaður og tlf. á persóni, sum vegna reiðaran, hevur ábyrgd av, at fløskurnar/tangarnir við halóni verða latnir til góðkendan móttakara (IRF, Tórhavnar kommunu ella útlendskan móttakara).

- ▶ Tá fløskurnar/tangarnir verða latnir góðkendum móttakara, skal reiðarin ansa eftir at fáa eina móttøkuváttan, har navn á reiðarí, skipi og nøgd av halóni er áteknað,
- ▶ Í seinasta lagi ein mánað eftir, at halónskipanin er tikin niður, skal reiðarin lata Umhvørvisstovuni avrit av móttøkuváttan frá góðkenda móttakaranum.

Fyrstu ferð útgivin: 17.10.2012
Seinast dagførd: 17.10.2012
Útgáva nr.: 1



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo